# So telva teir á triðja sinni

**Leygardagin setti Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur í Klaksvík, triðju altjóða talvkappingina, 3rd Klaksvík International**

TALV
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Leygardagin klokkan eitt var triðja altjóða talvkappingin, sum Rani Nolsøe skipar fyri, sett í býráðshøllini í Klaksvík.

Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur setti kappingina og flutti tann fyrsta leikin, sum staðfesti, at kappingin er byrjað.

– Føroyar eru eitt lítið land, og lítil lond hava tørv á stórum kunnleika, og tí er



*Heini Olsen er ein av føroysku luttakarunum á altjóða talvkappingini sum nú um dagarnar verður hildin á triðja sinni í Klaksvík*

*Mynd: Norðlýsið*

tað mær ein frøi at kunna verða við til at seta hesa talvkappingina, segði Eyðgunn millum annað í røðu sínari.

Hon segði eisini, at føroyingar eiga nøkur stór talent innan talvheimin, og tí heldur Klaksvíkar kommuna, at tað er av stórum týdningi, at føroysku telvararnir til tíðir møta størri avbjóðingum enn teir gera í vanliga gerandisdegnum.

Kappingin byrjaði so leygardagin, og heldur fram til komandi leygardag. Telvað verður í býráðshøllini.

Eftir trý umfør hevur sitandi føroyameistarin, Martin Poulsen, lagt seg á odda saman við svenska altjóða meistaranum, Emil Hermansson, sum samtundis er tann, ið hevur hægstu styrkistølini av luttakarunum í kappingini.

Martin og sviin hava tvey stig hvør eftir trý umfør. Tað vil siga, at Martin skal ogna sær fýra og eitt hálvt stig aftur at tey komandi sjey umførini fyri at kunna ogna sær ein IM norm.

Seks telvarar eru við. Tríggir útlendskir altjóða meistarar og tríggir føroyingar, og teir telva tvey talv móti hvørjum øðrum.

# Talvolympiadan á Mallorka

**Trý avboð á upprunaliga úttikna OL - liðnum, góvu pláss fyri John Rødgaard, Eyðun Nolsøe og Carl Eli N. Samuelsen. Í Klaksvík er Martin Poulsen á odda í 3rd Klaksvík International**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Føroyska talvlandsliðið fer í døgunum 14-31. oktobur til sponsku feriuoyggjuna Mallorka, har talvolympiadan í ár verður hildin. Eitt rættiliga populistiskt val av spælistaði, um samanborið verður við t.d. OL í 1996, sum varð leikt í Jerevan, Armenia. Støðan var tá spent í Armenia og fleiri lond valdu tá at ikki taka lut. Føroyingar ræddust tó ikki eld og møttu upp, hóast risastór tanks og aðrir hernaðarligir lutir til tíðir



*Tveir av teimum úttiknu telvarunum til OL-landsliðið. John Rødgaard og Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum kom við uppá avboð frá John Arna Nilssen*

*Savnsmynd*

kringsettu høvuðsstaðin og spælistaðið.

Seks mans manna landsliðið, tvs. fýra fyrstvaldir og síðani tveir eykamenn. Talvsambandið hevur úttikið liðið. Kappingin fevnir um trettan umfør og tí er skilagott at hava eykamenn at taka nøkur tøk, tá menn verða møddir o.a.

Longu innan úttøkuna 12. august, var greitt, at Heini Olsen og Flóvin Tór Næs ikki høvdu stundir í heyst. Hinir á útvalda liðnum vórðu: John Arni Nilssen, Martin Poulsen, Hans Kristian Simonsen og Olaf Berg. John Rødgaard og Eyðun Nolsøe komu síðani á liðið fyri Heina og Flóvin.

Í seinastu viku gav okkara sterkasta vápn, John Arni Nilssen, avboð. Talvsambandi heitti á greinaskrivaran, sum játtaði fegin og takkaði fyri álitið.

### Endaliga OL - liðið 2004

1 Martin Poulsen (2292) 20 ár
2 Hans Kristian Simonsen (2270) 20 ár
3 Olaf Berg (2257) 17 ár
4 IM John Rødgaard(2269) 49 ár
5 Eyðun Nolsøe (2233) 38 ár
6 Carl Eli N. Samuelsen (2213) 25 ár

Tað er ein dyggur stoytur, at okkara fremstu tríggir telvarar hava givið avboð. Liðið tykist rættiliga javntsterkt og ikki minst ungt: 1-3. borð er metungt og spennandi verður at síggja hvussu teir fara at klára uppgávuna móti væl sterkari mótstøðu og tittultelvarum. Í øllum førum hevur Martin Poulsen fleiri spennandi avbjóðingar fyri framan á fyrsta borði.

Komandi vikurnar verður frætt meira um OL-fyrireikingar, mál og vónir.

### 3rd Klaksvík International

Triðja árið á rað skipar Rani Nolsøe, í samstarv við danan Mogens Nielsen, fyri altjóða talvkapping í norðoyggjum. Í ár verður telvað í býráðssalinum í Klaksvík. Ikki var nógv at hoyra um kappingina innan startskotið, men tað hevði sínar orsøkir. Rani fekk nevnliga í seinastu løtu fíggjarliga partin at hanga saman og kappingin kundi tí fara av bakkastokki leygardagin.

Í skrivandi løtu eru trý umfør leikt. Luttakararnir eru: IM Emil Hermansson, IM Jens Ove Fries Nielsen, IM Sævar Bjarnason, Heini Olsen, Martin Poulsen og Ólavur Simonsen. Telvað verður dupultumfar, tíggju umfør í alt.

Martin er saman við Hermansson á odda við tveimum stigum. Heini, Ólavur og Jens Ove hava hálvtannað stig og aftastur er Sævar við hálvum stigi.

Sanniliga ein góð føroysk byrjan. Kravið til ein IM-norm er 6,5 stig av 10 møguligum. Als ikki ógjørligt. Martin vann eitt gott talv móti dananum Jens Ove sunnudagin og tendensurin tykist góður hjá føroyameistaranum og komandi fyrsta borð í OL. Heini og Ólavur hanga somuleiðis væl í.

Í komandi talvgrein verður gjørt meira burturúr kappingini. Fylgið við kappingini á nýggju heimasíðuni hjá Klaksvíkar Talvfelag, sum Ólavur Simonsen hevur gjørt og stendur fyri: www.ktfchess.com.

# Talvið hesa vikuna

Martin Poulsen (2319 elo) — Jens Ove Fries Nielsen (2398 elo)

3rd Klaksvík International (3. umfar), 28.08.2004

1.Rif3 d5 2.c4 dxc4 3.e3 Rif6 4.Bxc4 a6 5.a4 Ric6 6.d4 Bg4 (Ikki ein so mangan leiktur variantur í móttikið dronningagambit) 7.Be2 e6 8.0—0 Bd6 9.Ric3 0—0 10.h3 Bh5 11.Kh1 Rid5 12.Bd2 Ridb4 13.Rie4! (Riddarin sleppur væl við í leikin) 13...Be7 14.Rig3 Bg6 15.Bc3 Rid5 16.Fd2 Bd6 17.Rie5 (Martin risikerar eitt vet við hesum leiki, sum splittar finnustøðuna) 17...Bxe5 18.dxe5 Fg5 19.Bf3 Rad8 20.Bxd5 Rxd5 21.Fe1 Bd3 22.f4 Fh4 23.Rf3 Rfd8 24.Ff2 Bc4



Støðumynd aftaná 24...Bc4

25.f5! exf5?? (Neyðugt var at leika t.d. Bb3, Bd3 ella Fh6) 26.Rf4 Rd1+ 27.Rxd1 Rxd1+ 28.Kh2 Fd8 29.Rxc4 Fd5 30.Rf4 1—0



# Søgulig løta á Argjum

**Tá TB misti stig, samstundis sum AB greiddi sína skyldu, eru argjamenn nú fyri fyrstu ferð nakrantíð á odda í aðru deild**

2. DEILD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

AB er fyri fyrstu ferð í 31 ára gomlu søgu felagsins á odda í aðru deild. Leygardagin hevði AB heimadyst móti VB, sum enn ikki hevur vunnið dyst í ár.

Og hóast fortreytirnar gjørdust góðar hjá VB, sum dysturin leið, so fingu teir heldur einki burtur úr á Argjum. Eyðun Samuelsen hevði við tveimum perlum lagt heimaliðið upp á 2-0, men upplagdi stórsigurin fekk eitt álvarsligt skot fyri bógvin, tá Hans Jørgen Djurhuus longu um miðjan fyrra hálvleik varð rikin av vølli.

Hóast hetta, so megnaði AB at halda fast um leiðsluna gjøgnum at kalla allan dystin, men við bara níggju minuttum eftir at spæla minkaði VB tó um munin við einum máli frá Sigmundi Mikkelsen. Hetta fekk vágbingarnar at spenna álopsbogan, og so kundi Ragnar Poulsen staðfesta AB sigurin. Samstundis komu boð úr Sumba um, at TB hevði mist stig á Krossinum, og so var frøin stór á Argjum.

TB hevði annars góð kort á hondini í Sumba. Talan var um ein lívligan dyst, har álopini skolaðu báðar vegir, men tá TB í seinna hálvleiki fekk tillutað brotsspark, tóktist sigurin vera teimum heilt nær. Ikki minst tá sumbingar samstundis fingu mann riknan av vølli.

Tvørámenn mundu tó halda ondini, tá Einar Petersen misnýtti brotssparkið, men retururin fall eisini til hansara, og tá misnýtti hann ikki.

Við einum manni í undirtali eydnaðist tó Sumba at javna, tá Hallur Dam Joensen høgdi bóltin úr 25 metrum upp í krókin. Báðir partar royndu eftir hetta at finna eina avgerð, men tað eydnaðist ikki, og so stóð greitt, at TB hevði mist oddasessin.

Talan var eisini um steypadyst, nú bygdastevna var í Sumba, og eftir brotssparkskapping kundu heimamenninir fegnast um, at teir fingu eitt steyp á degnum.

Eisini B71 misti týðandi fet, tá teir vitjaðu í Leirvík. Leirvíkingar hava koyrt við fullari ferð síðani summarsteðgin, og í hesa ferð gjørdist talan so um fjórða sigurin á rað. Petur Sjúrðaberg skoraði einasta málið í dystinum tíðliga í seinna hálvleiki, og við hesum er LÍF nú partur av breiða miðjufeltinum, eftir at teir alla fyrru hálvu vóru í stórum niðurflytingarvanda.

FS Vágar vunnu tryggan sigur, tá saman um kom, tá B36 vitjaði. B36 var annars á odda í steðginum, men í seinna hálvleiki vendi myndin fullkomuliga. Fýra ferðir skoraði heimaliðið, soleiðis at teir nú aftur eru nær bronsumerkjunum. Tað er annars vert at leggja til merkis, at ein av málskjúttunum hjá heimaliðnum var Tór-Ingar Akselsen. Hann hevur verið staddur uttanlands hetta kappingarárið, men nú er hann aftur komin á klettarnar, og einki er at ivast í, at hann fer at vera góður styrkur hjá FS Vágum seinast dystirnar í kappingini.



*AB er á odda í 2. deild fyri fyrstu ferð í søgu felagsins. Her hevur tvífaldi málskjúttin Eyðun Samuelsen tamarhald á støðuni, meðan Tórður Holm ikki kann gera annað enn at eygleiða bóltsnillingin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinasti dysturin hetta umfarið var í Hvalba, har KÍ vitjaði, og gjørdi Alexandar Radosavljevic bart. Ikki færri enn fýra ferðir var hann rætti maðurin á rætta staðnum, og so munaði tað lítið hjá KÍ, at teir minkaðu munin í 4-1.

### Úrslitini

**AB-VB 3-1 (2-0)**
1-0: Eyðun Samuelsen
2-0: Eyðun Samuelsen
2-1: Sigmund Mikkelsen
3-1: Ragnar Poulsen

**Sumba-TB 1-1 (0-0)**
0-1: Einar Petersen
1-1: Hallur Dam Joensen

**LÍF-B71 1-0 (0-0)**
1-0: Petur Sjúrðarberg

**FSV-B36 4-1 (0-1)**
0-1: Tummas H.Rubeksen
1-1: Jákup Joensen
2-1: Sonni Johansen
3-1: Tór-Ingar Akselsen
4-1: Jákup Joensen

**Royn-KÍ 4-1 (4-0)**
1-0: Alex.Radosavljevic
2-0: Alex.Radosavljevic
3-0: Alex.Radosavljevic
4-0: Alex. Radosavljevic
4-1: David Bertholdsen

## Máltindurin

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Rógvi Jacobsen | HB | 12 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 9 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 8 |
| John Petersen | B36 | 7 |
| Heine Fernandez | HB | 7 |
| Jacob Bymar | KÍ | 7 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 6 |
| Sorin Anghel | EB/S | 5 |
| Heðin á Lakjuni | HB | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 5 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 5 |
| Erling Fles | KÍ | 5 |
| Egil á Bø | B36 | 4 |
| Jákup á Borg | HB | 4 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 4 |
| Mindaugas | VB | 4 |

## 1. deild menn

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 14 | 11 | 2 | 1 | 40 | 12 | 28 | 35 |
| 2 B36 | 14 | 8 | 3 | 3 | 26 | 15 | 11 | 27 |
| 3 Skála | 14 | 8 | 2 | 4 | 28 | 18 | 10 | 26 |
| 4 GÍ | 14 | 6 | 3 | 5 | 24 | 25 | -1 | 21 |
| 5 VB | 14 | 5 | 4 | 5 | 18 | 16 | 2 | 19 |
| 6 KÍ | 14 | 4 | 7 | 3 | 19 | 18 | 1 | 19 |
| 7 NSÍ | 14 | 5 | 3 | 6 | 22 | 19 | 3 | 18 |
| 8 EB/Streymur | 14 | 5 | 3 | 6 | 23 | 21 | 2 | 18 |
| 9 ÍF | 14 | 3 | 1 | 10 | 20 | 43 | -23 | 10 |
| 10 B68 | 14 | 0 | 2 | 12 | 10 | 43 | -33 | 2 |

## 2. deild menn

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 13 | 9 | 2 | 2 | 24 | 15 | 9 | 29 |
| 2 TB | 13 | 9 | 1 | 3 | 35 | 16 | 19 | 28 |
| 3 B71 | 13 | 7 | 2 | 4 | 34 | 26 | 8 | 23 |
| 4 FSV | 13 | 6 | 3 | 4 | 44 | 24 | 20 | 21 |
| 5 Royn | 13 | 7 | 0 | 6 | 31 | 29 | 2 | 21 |
| 6 Sumba | 13 | 5 | 4 | 4 | 20 | 22 | -2 | 19 |
| 7 LÍF | 13 | 5 | 3 | 5 | 21 | 25 | -4 | 18 |
| 8 B36 | 13 | 3 | 2 | 8 | 17 | 38 | -21 | 11 |
| 9 KÍ | 13 | 2 | 3 | 8 | 22 | 31 | -9 | 9 |
| 10 VB | 13 | 0 | 4 | 9 | 11 | 33 | -22 | 4 |

## Danska superligan

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Silkeborg | 5 | 3 | 1 | 1 | 10 | 7 | 3 | 10 |
| 2 Brøndby (S) | 5 | 3 | 1 | 1 | 6 | 3 | 3 | 10 |
| 3 FCM | 5 | 3 | 0 | 2 | 8 | 8 | 0 | 9 |
| 4 AGF | 5 | 2 | 2 | 1 | 8 | 5 | 3 | 8 |
| 5 Esbjerg | 4 | 2 | 1 | 1 | 13 | 6 | 7 | 7 |
| 6 OB | 5 | 2 | 1 | 2 | 9 | 7 | 2 | 7 |
| 7 FC Nordsj. | 5 | 2 | 1 | 2 | 7 | 7 | 0 | 7 |
| 8 Viborg | 5 | 2 | 1 | 2 | 5 | 6 | -1 | 7 |
| 9 Herfølge | 5 | 2 | 1 | 2 | 5 | 10 | -5 | 7 |
| 10 FCK (M) | 5 | 1 | 3 | 1 | 10 | 10 | 0 | 6 |
| 11 AaB | 5 | 1 | 0 | 4 | 7 | 9 | -2 | 3 |
| 12 Randers FC | 4 | 0 | 0 | 4 | 2 | 12 | -10 | 0 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HIK | 4 | 3 | 1 | 0 | 11 | 4 | 7 | 10 |
| 2 Vejle | 4 | 3 | 0 | 1 | 14 | 7 | 7 | 9 |
| 3 Sønderjyske E | 4 | 3 | 0 | 1 | 13 | 6 | 7 | 9 |
| 4 Skjold | 4 | 3 | 0 | 1 | 9 | 6 | 3 | 9 |
| 5 AB | 4 | 3 | 0 | 1 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 6 Køge | 4 | 2 | 2 | 0 | 18 | 8 | 10 | 8 |
| 7 Frem | 4 | 2 | 2 | 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 8 Fremad Am. | 4 | 2 | 1 | 1 | 8 | 4 | 4 | 7 |
| 9 Fredericia | 4 | 2 | 0 | 2 | 12 | 6 | 6 | 6 |
| 10 AC Horsens | 4 | 1 | 1 | 2 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 11 Næstved | 4 | 1 | 1 | 2 | 5 | 8 | -3 | 4 |
| 12 NFA | 4 | 0 | 2 | 2 | 7 | 11 | -4 | 2 |
| 13 B 93 | 4 | 0 | 2 | 2 | 6 | 14 | -8 | 2 |
| 14 Brønshøj | 4 | 0 | 1 | 3 | 4 | 13 | -9 | 1 |
| 15 Ølstykke | 4 | 0 | 1 | 3 | 1 | 15 | -14 | 1 |
| 16 Dalum | 4 | 0 | 0 | 4 | 2 | 14 | -12 | 0 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jetsmark | 4 | 3 | 1 | 0 | 10 | 6 | 4 | 10 |
| 2 Kolding FC | 4 | 3 | 0 | 1 | 10 | 4 | 6 | 9 |
| 3 Glostrup | 4 | 3 | 0 | 1 | 11 | 6 | 5 | 9 |
| 4 B 1913 | 4 | 3 | 0 | 1 | 10 | 5 | 5 | 9 |
| 5 Brabrand | 4 | 2 | 1 | 1 | 12 | 6 | 6 | 7 |
| 6 Slagelse | 4 | 2 | 1 | 1 | 8 | 5 | 3 | 7 |
| 7 B 1909 | 4 | 2 | 1 | 1 | 5 | 3 | 2 | 7 |
| 8 Holstebro | 4 | 1 | 1 | 2 | 7 | 8 | -1 | 4 |
| 9 Hjørring | 4 | 1 | 1 | 2 | 7 | 8 | -1 | 4 |
| 10 Holbæk | 4 | 1 | 1 | 2 | 5 | 7 | -2 | 4 |
| 11 Lyngby | 4 | 1 | 1 | 2 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 12 Næsby | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 6 | -2 | 3 |
| 13 Kalundborg | 4 | 1 | 0 | 3 | 6 | 12 | -6 | 3 |
| 14 Værløse | 4 | 1 | 0 | 3 | 6 | 13 | -7 | 3 |
| 15 Roskilde | 4 | 1 | 0 | 3 | 1 | 9 | -8 | 3 |
| 16 Aarhus Fr. | 3 | 0 | 2 | 1 | 5 | 6 | -1 | 2 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

## Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍBV | 16 | 8 | 4 | 4 | 31 | 17 | 14 | 28 |
| 2 FH | 15 | 7 | 7 | 1 | 23 | 14 | 9 | 28 |
| 3 Fylkir | 15 | 7 | 5 | 3 | 22 | 15 | 7 | 26 |
| 4 ÍA | 15 | 5 | 7 | 3 | 20 | 16 | 4 | 22 |
| 5 Keflavík | 15 | 6 | 3 | 6 | 21 | 26 | -5 | 21 |
| 6 KR | 15 | 4 | 7 | 4 | 18 | 17 | 1 | 19 |
| 7 Grindavík | 15 | 4 | 6 | 5 | 17 | 21 | -4 | 18 |
| 8 Víkingur R | 16 | 4 | 3 | 9 | 15 | 23 | -8 | 15 |
| 9 Fram | 15 | 3 | 5 | 7 | 16 | 18 | -2 | 14 |
| 10 KA | 15 | 3 | 3 | 9 | 10 | 26 | -16 | 12 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)